# Hin seinasti boðskapurin hjá Lord Baden Powell

Kæru skótar, um tit nakrantíð hava sæð sjónleikin "Petur Pan", vilja tit minnast, hvussu sjóræningarahøvdingurin altíð helt sína egnu gravtalu, ti hann óttaðist fyri, at hann, tá ið hansara tíð var at doyggja, kanska ikki fekk stundir at halda hana. Tað er næstan tað sama við mær, tú sjálvt um eg ikki doyggji beint nú, so verður tað ein av teimum fyrstu døgunum, og ynski eg tí at senda tykkum nøkur skilnaðarorð sum farvæl.

Minnist til at hetta er tað síðsta, tit nakrantíð hoyra frá mær so eg hugsi eitt sindur um tað.

Eg havi livað eitt ógvuliga lukkuligt lív, og eg ynski, at ein og hvør av tykkum eisini skal fáa eitt lukkuligt lív.

Eg trúgvi, at Guð hevur sett okkum í hesa vøkru verð at vera lukkulig og njóta lívið. Lukka kemur ikki av at vera ríkur, ella bert av hepni í tínum virki ella av sjálvgóðsku. Eitt stig ímóti lukku er, at tit gera tykkum raskar og sterkar, meðan tit eru dreingi, so at tit kunnu verða nyttugir og kunnað njóta lívið, tá ið tit eru vorðnir menn.

Ansur fyri natúruni vil vísa tykkum, hvussu Guð hevur fylt jørðina við undrunarverdum tingum, sum tit kunnu njóta. Verið glaðir yvir, tað tit hava, og roynið at fáa tað besta burtur úr tí. Hyggið upp á tað ljósu síðuna av sakini, í staðin fyri tað myrku.

Men tann rætti vegurin til lukku er at geva øðrum menniskjum lukku. Roynið at fara frá einari verð, ið er eitt sindur betri, enn tit funnu hana, og so, tá ið tykkara túrur kemur at doyggja, kunnu tit doyggja lukkuliga við tí vissu, at tit, ið hvussu so er, ikki hava spilt tíðina burtur, men gjørt tykkara besta. "Verið til Reiðar" á henda hátt at liva lukkuliga og doyggja lukkuliga.

Verið altíð trúgvir móti tykkara skótalyfti – sjálvt tá ið tit ikki longur eru dreingir – og Guð hjálpi tykkum til at vera tað.

Tykkara vinur

***BADEN - POWELL***